# Stórdystur í Paris

**Mikukvøldið verður størsti dysturin europeiski fótbóltsdysturin í ár spældur í Paris. Arsenal og FC Barcelona hittast í finaluni í Champions League**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Champions League er blivin størsta fótbóltskapping fyri europeisk feløg. Bara tey bestu feløgini við teimum bestu spælarunumm spæla við í hesari kappingini, og nú er komið fram til sjálva finaluna, sum skal spælast í Paris mikukvøldið.

Tað er ikki heilt óvæntað, at FC Barcelona er annað liðið í finaluni, tí liðið hevur alt hetta árið spælt frammúr góðan fótbólt og hevur eisini vunnið sponsku landskappingina. Ronaldinho er stóra skapandi miðpunktið á liðnum, men liðið er á tremur við góðum spælarum.

Tað er meira óvæntað, at enska felagið Arsenal er komið so langt. Felagið hevur havt stórar trupulleikar av skaðum í ár, og tá ið felagið seldi Patrick Vieira, mundu tey fægstu rokna við, at liðið kundi spæla seg í finaluna í Champions League.

Men Wenger og hansara menn hava tikið øll á bóli, og tann eini sigurin, sum Wenger manglar í sínari tíð sum venjari hjá Arsenal, er nú bara 90 minuttir burtur.

### Ymisk lið

Í fjør vann enska felagið Liverpool Champions League kappingina, og tað var eftir ein ótrúligan dyst ímóti AC Milan. Tað kann neyvan roknast við einum slíkum dysti í ár, hóast bæði Arsenal og Barcelona kunnu spæla væl.

Fyrrverandi hjálparvenjarin á danska a-landsliðnum, Keld Bordinggaard, segði sunnudagin við onside, at tað eru tvey ymisk lið, sum spæla ímóti hvørjum øðrum mikukvøldið.

- Barcelona stendur fyri øllum tí, sum fótbóltur snýr seg um. Teir vilja hava bóltin, og teir vilja gera nakað við bóltinum. Arsenal spælir meira beinleiðis, men teir vísa, at beinleiðis fótbóltur eisini kann verða væl spældur og undirhaldandi, segði Keld Bordinggaard.

Dysturin ímillum Arsenal og Barcelona byrjar kl. 19.45 mikuvkøldið, og millum annað TV3+ sendir dystin beinleiðis.

## Formulaliðið

*Ítróttar-Sosialurin mannar Formulaliðið við spælarum, sum stóðu seg væl í 8. umfari av Formuladeildini.*

*(Formulaliðið grafikkur)*







Á Almannastovuni starvast 100 starvsfólk. Á Økisdeildini í Havn starvast 16 fólk – harav 9 eru sosialráðgevar.

# Sosialráðgevi
## til Økisdeildina í Havn

Á deildini hjá Almannastovuni í Havn, Tinghúsvegur 14, er eitt fulltíðarstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja. Sum sosialráðgevi á eini økisdeild fært tú innlit og førleika í nærum alla tu føroysku sosiallóggávuna. Arbeiðið er sjálvstøðugt og avbjóðandi.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara, á tel 35 35 10, ella við at fara inn á heimasíðu okkara www.almannastovan.fo ella á www.portal.fo.

Umsóknarfreistin er týsdagin 30. mai 2006 kl. 12.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80





Á Almannastovuni starvast 100 starvsfólk. Á Økisdeildini í Havn starvast 16 fólk – harav 6 eru málsviðgerar.

# Avloysarastarv sum **málsviðgeri** á Almannastovuni

Á Økisdeildini í Havn, Tinghúsvegur 14, er eitt ¾-tíðar starv sum avloysari fyri málsviðgera í barnsburðarfarloyvi leyst at seta skjótast gjørligt. Høvuðsuppgávan er at rokna út og ávísa veitingar. Hevur tú skrivstovuútbúgving, HH ella aðra viðkomandi útbúgving og royndir og hevur tú hug at arbeiða í einum umhvørvi, har nógv er at gera, so er hetta kanska nakað fyri teg.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara, á tel. 35 35 10 ella við at fara inn á heimasíðu okkara almannastovan.fo ella á portal.fo.

Umsóknarfreistin er týsdagin 30. mai 2006 kl. 12.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80



# KT-fólk til FT Samskifti

*At endurtaka tað, sum onnur hava gjørt krevur útbúgving – at bjóða tí av krevur heila.*
- Mary Pettibone Poole



Føroya Tele virkar á einum liberalisaðum telemarknaði, har alt fleiri tænastur og veitingar standa kundunum í boði.
Til Vinnutøkni, sum fæst við tøkniliga partin av samskiftisloysnunum til vinnukundar okkara, søkja vit eftir einum KT-fólki at menna og halda viðlíka KT-partin av hesum arbeiði.

Í starvinum eru nógvar, nýggjar avbjóðingar. Arbeitt verður í einum spennandi og broytiligum umhvørvi saman við dugnaligum starvsfelagum, har vit leggja dent á gott samstarv. Uppgávurnar eru bæði innanhýsis og mótvegis kundum og fevna í høvuðsheitum um hesi øki: Rakstur og viðlíkahald, stuðul hjá kundarøkt (2nd line support), produktmenning og verkætlanarleiðsla.

**Høvuðsábyrgdarøkið er samskiftisloysnir, herundir:**
- VoIP
- servararaloysnir og netverk
- vekslarar við tilhoyrandi applikatiónum
- tráðleyst IP
- mannagongdir við serligum atliti til trygd

**Tað er ein fyrimunur, um umsøkjari:**
- dugir at arbeiða sjávstøðugt og at taka ábyrgd
- er nærløgd/-lagdur og samstarvsfús/-ur
- er fyrikomandi og dugir at tosa við kundar
- kann samskifta á enskum í skrift og talu
- hevur kunnleika ella royndir innan netloysnir
- er KT-verkfrøðingur ella hevur eina aðra viðkomandi tekniska útbúgving og/ella royndir við samskiftistøkni

Neyðug upplæring fer fram sum síðumanslæra og við neyðugum skeiðum.

Meira fæst at vita um starvið frá Hendriki Olsen tel 303362 ella frá Starvsfólkadeildini á Føroya Tele.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. mai 2006.

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarúgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi.
Í felagnum starvast 110 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.